# inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Sethús – Húsagøta 19, Kollafjørður

Hugnaligu húsini eru í tveimum. Hartil er hjallur og úthús (gróthús). Annað húsið er 38,8 og hitt 22,8 í alt 61,6 $m^2$. Húsini kunnu byggjast saman. Grundøkið er 453 $m^2$. Upprunaliga byggiárið er 1797, men alt er bygt um og av nýggjum í 1992 so sum veggir, gólv, rør, el, frárensl, vindeygu o.a. Í øðrum húsinum er inngongd, durur, køkur, stova, kamar, baðirúm og eitt lítið kamar / hemsur yvir stovuni. Í hinum er inngongd, fýrrúm / vaskirúm og nýtt baðirúm. Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi, nær við barnagarð, skúla, kirkju, samkomuhús, læknahús, handil, bankar, býbuss til Havnar. Frálíkt útsýni er yvir bygdina og fjørðin.

**Prísuppskot : 700.000**



## Sethús – Lækjuvegur 7 Eiði

Húsini, sum verða nevnd Jákupstovuhúsini, eru í 3 hæddum á uml. 36 fermetrar - í alt 108 fermetrar. Grundøki er 113 $m^2$. Byggiár uml. 1900. Í ovastu hædd eru 3 kømur og gongd. Í miðhæddini er gongd, wc, kamar, stova og køkur. Í kjallarinum er kjallararúm/fýrrúm. Húsini liggja niðri við kaiøkið, har er friðaligt og gott útsýni. Húsini eru vælegnaði sum summarhús

**Hóskandi boð ynskist.**



## Sethús – Árgøta 8, Miðvágur

Sethús í trimum hæddum, íalt samlað búvídd uml. 78 fermetrar, harafturat er ein tilbygningur uppá uml. 20 fermetrar. Upprunaliga eru húsini bygd 1913, 1958 eru húsini høvuðsumvæld og víðkað við tilbygninginum. Í miðhæddini er inngongd, gongd, trappa til loft, køkur, stova , spísistova og baðirúm. Á loftinum er gong og trý kømur. Kjallarin er óinnrættaður, veggirnir í kjallarinum eru lagaðir við gróti. Húsini eru eini gomul hugnalig hús, mitt í gomlu bygdini, sera gott útsýni út á fjørðin.

**Prísuppskot : 500.000**



## Sethús – Gerðisvegur Miðvágur

Nýggju húsini eru í 2 hæddum – hvør á 144 $m^2$ – í alt 288 $m^2$. Grundøkið er 580 fermetrar. Byggiár: 2008. Í erva er inngongd / gongd, grovkøkur / bryggers / vaskirúm, køkur / alrúm / borðsstova / stova við útgongd til útigólv / altan, hjúnarrúm við klædnarúmi, baðirúm og 2 kømur. Í neðra er garaga við fjarstýrdari garaguhurð og inngongd til stórt rúm, ið kann innrættast. Tekningar og tilfarslisti eru vegleiðandi, tí avtala kann gerast um broytingar av innrætting og tilfari eftir egnum ynski. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við góðum útsýni yvir bygdina, bátahylin og fjørðin. Stutt er til skúla, dagstovn handlar o.a. Møguleiki er fyri at fáa uml. kr. 125.000,00 í mvg. aftur av arbeiðslønini.

**Prísuppskot : 1.6 mill**



## Randarhús – Vesturgøta 12, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum, samlað búøkið 140 fermetrar og alt er innrættað. Grundøkið er 154 fermetrar. Byggiár 1984. Á loftinum eru 3 kømur, baðirúm og gongd. Í miðhæddini eru køkur, stova við útgongd til altan. Í kjallarahæddini eru durur, gongd, kamar,baðirúm og vaski-/fýrrúm. Terassa kann lættliga gerðast omanfyri húsini. Parkeringspláss til 2 bilar er frammanfyri húsini. Húsini standa í barnavinarligum, friðarligum og veður-góðum umhvørvi og hava gott útsýni.

**Prísuppskot : 1.8 mill**



## Sethús – Rygsgøta 4, Argir

Húsini eru í 2 hæddum á 72 $m^2$ og loft á uml. 60 $m^2$ - í alt uml. 204 fermetrar. Grundøkið er 499 m2. Byggiár: 1992. Í miðhæddini er inngongd, durur, hall við upp- og niður-gongd, gestawc, borðsstova / stova / hugnastova, køkur / alrúm og kovi. Í ovastu hædd er trappugongd, gongd, hjúnarrúm við útgongd til altan, barðirúm við brúsu og baðikari og 1 kamar. Í niðastu hædd er inngongd, vaski-rúm, fýrrúm / kjallararúm í fullari loftshædd, ið kann innrættast. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Útsýnið er frálíkt yvir Havnina og fjørðin – panorama av loftinum. Stutt er til dagstovn og skúla (nýggjur skúli verður bygdur nær við). Busssambandið er gott og nýtt vegasamband við nýggjum ringvegi verður í næstum.

**Prísuppskot 1.9 mill**



## Sethús – Mylnugøta 20 Klaksvík

Húsini eru í 2 hæddum á uml. 60 fermetrar - í alt 120 fermetrar Grundøki er 630 $m^2$. Byggiár 1949.. Í ovastu hædd er gongd, køkur, 2 stovur, kamar, klædnarúm og niðurgongd til niðastu hædd. Í niðastu hædd er kjalla-rúm/fýrrúm, vaskirúm, 2 kømur, wc og baðirúm. Húsini standa miskeiðis í býnum, í friðarligum umhvørvi og hava gott útsýni.

**Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.**



## Tvíhús – Lynggøta 5, Norðskáli

Í mai mánaði 2008 varð farið undir at byggja eini tvíhús á Lynggøtu við Norðskála, sum eru um at verða liðug Húsini eru í 1 hædd - samlað búvídd 95 fermetrar. Eisini er eitt ovasta loft íð kann innrættast Húsini hava føroyaprofil klædning svart alminiumstak, tætt tróður við dúki, plas-tikk vindeygu og úthurðar. Innhurðarnar verða fyllings-hurðar ( Finland), og gólvini á vesinum verða sveisivenyl. Tey eru innrættaði soleiðis: Durur, gongd, baðirúm, forstova , 2 kømur, hjúnarrúm, grovkøkur, køkur,og stova. Møguleiki er at velja gólv og køk eftir egnum ynski. Eisini kemur eitt goymslurúm at hoyra til húsini.

**Prísuppskot 1.150.000**



## Sethús – Brattabrekka 15, Tórshavn

Húsini eru tveimum hæddum við tveimum íbúðum á 100+100 - í alt samlað búvídd á uml. 200 fermetrar. Á veghæddini er inngongd, gongd / trappa upp til mið-hædd, kjallara/fýrrúm, stova køkur baðirúm, og tvey kømur. Á miðhæddini er gongd, køkur, spísistova/stova, hjúnarrúm, baðirúm og tvey kømur. Bygd 1963 og framdar umvælingar 1983 og vindeyguni skift 1992/1997. Húsini liggja væl fyri í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi, fá fet frá Gundadali. Húsini hava stóran hugnaligan garð við trøðum og runnum. Skjótt til gongu oman í býin, gott busssamband.

**Prísuppskot : 1.9 mill**



## Sethús – undir Reynum, Sandur

Hugnalig gomul sethús upprunalig bygd uml.1860 seinni umbygd. 1979 eru húsini høvuðs umvæld og útbygningur bygdur uppí húsini. Til húsini er úthús og hjallur.Ein partur verður leigaður út til skúlastovu. Húsini eru í tveimum hæddum við loft, upp í tróður, innrættað við gong og tvey kømur. ì miðhæddini er: durur, gong, trappa til loft og kjallara, køkur/spísistova, stova, millumgong og hurð til útbygning sum er skúlastova. Í kjallarinum er: gong, baðirúm við brúsu og tvey kømur og kjallararúm. Húsin eru sera hugnalig og liggja væl fyri, mitt í gomlu bygdini, beint við gamla skúlan og handil.

**Prísuppskot 800.000,00**



## Sethús Gundadalsvegur 23, Tórshavn

Stór sethús við bilskúri í tveimum hæddum á 105 fermetrar hvør hæddin - í alt samlað búvídd á uml. 210 fermetrar. Í ovarahæddini er inngongd, gongd trappa niður á veghæddina, wc, køkur spísistova, stova við fronskum hurðum ímillum, hjúnarrúm og eitt kamar. Niðarahæddin: gong, 4 stór kømur, køkur, baðirúm við brúsu og vaskirúm. Niðarahæddin er væl egnað til at leiga út sum íbúð ella kømur. Húsini eru bygd í 1970, men eru gjørd ístand, so sum, nýggjur køkur, ketil o.a. Húsini liggja rætt ímun til sólina, frá stovuni er hurð út á stóra altan, undir altanini er góður bilskúrur. Húsini liggja væl fyri í Gundadali, sera veðurgott stað. Beint við ítróttavøll, ítróttahøll, svimjuhøll, v.m. Útsýnið oman á vøllin og oman í býin.

**Prísuppskot 2.8 mill**



## Sethús – Hvarvið 6, Tórshavn

Arkitektteknaði sethús í einari hædd 147 fermetrar + lítil kjallari við fýrrúm og ítrivsrúm 17 fermetrar - í alt samlað búvídd á uml. 164 fermetrar. Grundøkið er 508 fermetrar. Á veghæddini er durur, gongd við hurð út til terassu, toilet, køkur, grovkøkur/vaskirúm, hjallur, stova, millum-gongd, hjúnarrúm, 2 kømur, baðirúm við brúsu og klædnarúm. Í kjallarahæddini er ítrivsrúm, fýrrúm við arbeiðsborði og trappa upp til veghæddina, hurð er út til havan. Húsini eru sera væl hildin bæði uttan og innandura. Girðing úr gróti við træstakitt kring alla ognina. Vælhildin havi við runnum og blómun. Túni og terassa eru við føroyskum gróti. Ognin liggur í friðaligum íbúðarøki við blindan veg, stutt frá miðbýnum við sera góðum útsýni yvir havnina og Nólsoyarfjørð.

**Prísuppslot 3.2 mill**



## Sethús – Bøkjarabrekka 13, Tórshavn

Húsini eru í trimum hæddum við høgari reising og kvisti. Samlað gólvvídd uml.260 fermetrar. Í kjallarinum, gong, køkur, stova, trý kømur, wc og fýrrúm. Í miðhæddini er gongd, trappa upp á loftið, køkur, stova, trý verðilsir og wc. Á loftinum er gongd, trappa uppá kvist, køkur, stova, trý verðilsir og baðirúm, á kvistinum er eitt rúm við baðirúm og hurð út á altan. Húsini liggja væl fyri mitt í býnum, fáir minnuttir oman á Vaglið, men tó friðaligt, góður sólagangur. Frá ovastu hæddini er sera gott útsýni yvir allan býin og út á nólsoyar fjørð.

**Hóskandi boð ynskist**



## Sethús – á Heygnum 1 Kvívík

Nýggju sera snotiligu arkitektteknaðu orkusparihúsini eru 170 m2 í erva og 93 m2 í neðra – í alt 263 m2. Grundøkið er 637m2. Byggiár: 2008. Í erva er garaga, hjallur, inngongd, gongd, gestawc, grovkøkur / bryggers, køkur / alrúm / borðsstova við niðurgongd til niðastu hædd, arbejðsrúm, millumgongd, hjúnarrúm við stórum klædnarúmi, baðirúm og kamar. Í neðra er stova við útgongd til terassu, millumgongd, baðirúm, kamar og stórt vaskirúm við egnari útgongd. Laðagur og stoyptur garður er runt húsini. Tey standa í friðarligum, sera vøkrum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg nær við barnagarð, skúla og frítíðarskúla. Panoramaútsýni er yvir allan fjørðin. Húsini verða seld nærum liðug, so keyparin sjálvur kann velja tilfar og seta sín egna dám á húsini. Møguleiki er fyri at fáa mvg. av arbeiðslønini (max. kr.150.000,00) aftur.

**Prísuppskot 2.3 mill**



## Íbuð – undir Kongavarða H1 th Argir

Væl dámda íbúðin undir Kongavarða á 102 $m^2$ er til sølu. Bert hendan eina er eftir í hesari støddini. Íbúðin, sum er í gerð, er sera snøgg, væl gjørd og úr besta tilfari. Harafturat er felagsøki. Hon er væntandi liðug várið 2009. Har er trappurúm / lyfta, inngongd, gongd / forstova / garde-roba, baðirúm / vaskirúm, køkur, borðstova / stova við útgongd til svala, hjúnarrúm við útgongd til svala og kamar. Íbúðin liggur í friðarligum, náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við góðum tilplantaðum felagsøki, spæliplássi, sparkivølli og góðum parkeringsøki. Íbúðin er á 1. hædd í blokki H til høgru. Afturat keyps-kostnaðinum skal leggjast út kr. 150.000,00 fyri mvg, ið keyparin kann søkja um at fáa endurgoldið.

**Prísuppskot 1.538.710**



## Sethús – Dalatún 15, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum á uml. 49 fermetrar – í alt uml. 147 $m^2$. Hartil er garaga á uml. 20 $m^2$. Grundøkið er 323 $m^2$. Húsini eru bygd í 1950'unum, men eru umvæld og dagførd. M.a. er klædningur, tekja, baðirúm, ketil, oljufýr nýtt eins og køkurin er nakað nýggjur. Í miðhæddini er inngongd, gongd, bryggers, køkur, borðsstova / stova við útgongd til útigólv. Í ovastu hædd er trappugongd, baðirúm, 3 kømur og 1 goymslurúm. Í niðastu hædd er lágur kjallari. Har er fýrrúm / kjallararúm / hjallur / goymslurúm. Húsini standa nær miðbýnum í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi við blindan veg. Dagstovnar, skúlar, handlar og alt annað er beint við. Útsýnið er frálíkt av loftinum.

**Hóskandi boð ynskist**

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni